# Litveitslan heldur áfram








**Lýsandi sitrón og bleikari hoyggjgul pensilsstrok ljóma í glitrandi lithavi av turkis, grønum, violettum, reyðum, orange, okkur, pink, oliven fyri bara at nevna nakrar av litunum í stóra málninginum ”Modeller”. – Svans? Litkaos? Ruðuleiki? Nei, ikki tá tað er Torbjørn Olsen, sum stýrir penslinum.**

*Kinna Poulsen*
*myndir: Edna Fuglsan*

### Huset i Asnæs

Myndin hekk á eini serframsýning hjá Torbjørn Olsen í Huset í Asnæs, sum endaði 27.august og sum undirritaða einki visti um fyrr enn í síðstu løtu, dagin fyri, tá eg sá framsýningina, ið taldi 32 verk. Herav vóru 7 av myndunum steinprent, sum Torbjørn gjørdi við støði í altartalvumyndum, ið vórðu prentað á Grafiska Verkstaði Føroya og framsýnd í Ribarhúsi í Fuglafirði og í Snarskivuni í Havn. Restin var oljumálningar, harav tað mesta ikki var framsýnt áður og sum myndevnisliga fevndi um fólk, model- og portrettmyndir og ymisk landsløg, eisini býarlandsløg og myndir av skipamiðjuumhvørvinum í Havn, har Torbjørn Olsen hevur atelier. Myndirnar hingu væl í framsýningarskálanum, har tað hóast ikki so høgt til loftið, er rúmligt við sera góðum ljósumstøðum. Listaáhugaðir føroyingar kennast møguliga við henda framsýningarskála, ið hýsir fleiri føroyskum gestaframsýnarum; Zacharias Heinesen, Amariel Norðoy og Eyðun av Reyni. Huset i Asnæs er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at útbyggja tað danska list- og mentanarlívið. Húsið varð stovnað í 1973 av listafólkum í Dragsholm Kommunu.

### Perluportrett

Umframt eina sanna perlu av einum portretti, er tað í báðum teimum stóru modelkompositiónunum, at mest gongur fyri seg. Portrettið ”Litografen” er á hædd við eitt framúrskarandi portrett av Hera Smith, sum m.a. varð sýnt fram á Den Frie fyri nøkrum árum síðani og sum til alla eydnu er í føroyskari privatari ogn. Meðan andlitið hjá tí avmyndaða prentaranum er lutfalsliga naturalistiskt málað (og ógvuliga væl rakt), er kroppurin, beinini og stólurin rættiliga skitsukent við eini artistiskari, lætthentari konturstriku, sum leggur serligan dent á tey langlimaðu beinini. Maðurin er innan fyri svintuna í orangereyðari skjúrtu, sum gerst upplagt høvið hjá litmeistaranum at arbeiða við mótsetningslitinum í rúminum kring prentaran. Tað er sum um, at tað grøna rúmið á fabulerandi hátt lýsir ta lit- og listaverð, sum er prentarans.

### Modelkompositiónirnar

Arbeiðið við modellum er í sær sjálvum ikki nýtt